# Fiskivinnutíðindi úr Grønlandi

*v/ Kára við Sein*

**29. oktober**
Í dag er stilli og – 4.3 stig. Polar Natarnaq kom inn at landa í morgun. Har var alt fult. Teir skuldu landa mikudagin, men fingu framskunda landingina til mánamorgunin í staðin.

**31. oktober**
Í dag eru – 9 stig og lot av eystri. Sisimiut kom inn at landa í morgun. Teir løgdu 285 tons upp av svartkalva. Teir hava nakað eftir av svartkalvakvotuni longri suðuri og so er nakað av toskakvotu eftir. Meiningin var at fiska tað upp, áðrenn teir stevna yvir um hav. Teir skulla til Danmarkar á skipasmiðju, áðrenn teir fara í Barentshavið aftur áðrenn jól. Áðrenn teir loystu í kvøld kl 20, bjóðaðu teir mær oman til at eta saltgrind og spik. Á, tig og tala ikki, sum tað smakkaði. Ein deilig máltíð.



*Eysturoy: Alexandur Johansen, Gert Langgaard, Andras Joensen, Hilmar Joensen, Arnfinn Langgaard, Jan á Líðarenda, Magnus Skoralíð, Sjúrður Kass, Jónleif Jacobsen, Símun Louis Jacobsen, Kristian Kristiansen.*
*Hanna Thorleifsson, Reidun Rasmussen, Kinna Olsen, Carolina Johansen, Elin Dahl, Annie Klakk Olsen, Elin Sleire, Herdis Simonsen, Poula Gregersen, Eilen Olsen.*
*Kaja Joensen, Katrin Absalonsen, Alma Joensen, Annleyg Toftegaard, Maibrit Olsen, Vígdis Petersen, Kristine Ellingsgaard, Ida Jacobsen, Heidi Nón, Jensina Hansen*

unum fyri umleggingini til partafelag við virknaði frá 1. januar 2002. So stóra undirtøku høvdu vit ikki væntað!

Umleggingin hevði sera stóran týdning. Hon gav ábyrgdarunum møguleika at gerast partaeigarar, og harvið fáa lut í yvirskotinum. Harvið fingu teir beinleiðis peningaligan áhuga í at Sparikassin gav góð fíggjarlig úrslit, og tað at onkur hevur beinleiðis áhuga í tí ein ger, eggjar til betri lønsemi og gott arbeiði. Umleggingin merkti tí, at okkara starvsfólk ikki longur kundu seta spurnartekin við, at Sparikassin skuldi vinna pening. Tað stimbraði undir handilsliga hugburðin sum vit royndu at upparbeiða, og gjørdi Sparikassan betri førðan fyri at fasthalda og tiltrekkja dugnalig starvsfólk.

Fleiri aðrar positivar orsøkir vóru til at leggja um til partafelag, eitt nú gevur partafelagsformurin størri fleksibilitet at tillaga eginognina eftir tørvinum. Vit kundu t.d. ikki havt keypt Skandiabanken herfyri, uttan at hækka partapeningin – og í sambandi við keypið av 25% av Investea brúktu vit eisini partabrøv sum lutvíst gjald fyri keypið.

Umleggingin gjørdi eisini, at vit fingu Eik Grunnin, sum í dag hevur eina eginogn uppá 3,6 mia. kr., um vit rokna Eik partabrøvini til marknaðarvirði. Grunnurin hevur notið sera gott av Eik, men hann hevur samstundis verið og er ein sera góður og hentur viðspælari sum hevur givið og gevur okkum møguleikar, sum vit annars ikki høvdu havt.

## Kaupthing

Tað triðja sum hendi var, at vit gjørdu íløgur í Kaupthing, bæði í Føroyum, Íslandi og í Danmark. Tað hevði stóran týdning sum ein "eye opener" fyri teimum møguleikum sum vóru uttanlands, men kanska var tað serliga ein "eye opener" fyri tí hugburði, sum íslendskt vinnulív stendur fyri – og sum eg havi sera stóra respekt fyri. Tá vit byrjaði íløgurnar í Kaupthing í 2000 vóru tað fá í Føroyum sum høvdu serliga nógv til yvirs fyri íslendingum vinnuliga sæð – teir brúktu jú alt áðrenn teir tjentu pengarnar, føroysku flakavirkini vunnu nógv meira enn tey íslendsku og íslendska krónan var bæði veik og svikalig, var hugburðurin – eisini í umsjónarráðnum í táverandi Sparikassanum, tá vit løgdu uppskot um íløguna í Kaupthing fyri. Men tað varð samtykt, og var kanska ein tann mest týdningarmikla avgerðin í allari tilgongdini, tí hon flutti av álvara nøkur mørk!

## Alikreppan

Tað fjórða sum hendi hetta tíðarskeiðið – 1999 – 2004 – var alikreppan. Hon var ein dýrur læripengi, og vit brúktu meginpartin av 2003 og 2004 at koma á turt aftur. Lukkutíð, so varðveittu vit framdriftina kortini, og sluppu tá samanum kemur lutfallsliga væl burturúr alikreppuni. "Af skade bliver man klog, men sjældent rig" sigst, og er tað ein samanhangur millum hvussu stórur skaðin er og hvussu klókur man blívur, so blivu vit rættuliga klók!

## 2005-2007

Hetta tíðarskeiðið 1999 – 2004 var soleiðis eitt hugburðsmenningarskeið – soleiðis at vit kundu fara inn í næsta tíðarskeiðið, ið eg vil siga byrjaði í 2005 sum ein framkomin handilslig fyritøka við sera royndum og væl útbúnum starvsfólkum. Frá 2005 – 2007 er hent eins nógv og árini 1994 – 2004 tilsamans.

Vit keyptu Eik Bank Danmark, gjørdu íløgur í t.d. Spron, DSK, Investea, nianet, Privestor, Finansnyt, Skandiabanken og nú eisini Sethúsasøluna, vit skiftu navn til Eik Banki og blivu børsskrásettir, fyri bert at nevna nakað av tí týdningarmesta.

Eg las einaferð bókina "Good to Great" hjá Jim Collins, sum hevur verið ein av teimum mest gevandi bókunum eg havi lisið um leiðslu. Hann nýtir hugmyndina um "at fáa momentum á svinghjólið, so tað snarar skjótari og skjótari" – tá fyrst ferð er komin á, krevur tað minni orku at halda og økja ferðina.

Øll kenna jú, tá man skumpar undir ein bil – at fáa hann á rull er altíð tyngsta takið – men tá hann fyrst er byrjaður at flyta seg, krevur tað minni og minni orku.

Eitt er, hvat er hent. Men hvat er so loyndarmálið aftan fyri alt hettar her? Heilt einfalt, "it's all about people" – sjálvandi, hvat annað! Jú og "passión" – at brenna fyri sínum arbeiði... Vit hava í Eik sera nógv starvsfólk, sum hava verið sera longi á sama arbeiðsplássi, og sum eru góð við sítt arbeiðspláss og vilja tí væl. Tey eru villig til at taka eyka tøk, tey eru ábyrgdarfull og tey eru arbeiðssom. Ikki minst ger tað seg galdandi fyri leiðslutoymið – her hugsi eg um rakstrar- og stabsleiðarar og kanska serliga um leiðslubólkin, sum hevur lagt lív og sál í tilgongdina. Og partur nevndarinnar hevur heldur ikki ligið eftir – nevndin hevur verið sera virkin og konstruktiv og uttan hennara viðspæl, hevði tilgongdin ikki verið av nøkrum. Onki av hesum er komið av sær sjálvum, tað hevur kravt sera nógv arbeiði, sera tungar avgerðir til tíðir, men tað hevur samstundis fyri tað mesta verið stuttligt og gevandi.

Tá eg nevni "passión", so er tað ikki av tilvild. Skalt tú gera nakað framúr, so er tað ikki nokk, bara at dáma sítt arbeiði, ella at gera tað



*Vágar: Jóhann á Stongum, Elinborg Jacobsen, Ann Mikkelsen, Hansina á Plógv, Haldis Hansen, Maud Hansen og Sjúrður Poulsen*